Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

Upp á

fyrispurning frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 82/2019, viðvíkjandi ungdómsarbeiðsloysi.

Spurningurin var soljóðandi:

1. *Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi í sambandi við koronakreppuna?*
2. *Hvat er aldursbýtið á teimum, ið eru í serligu korona ALS-skipanini?*
3. *Hvussu er landafrøðiliga býtið av teimum, ið eru í serligu korona ALS-skipanini?*
4. *Hvussu eru tey, ið fáa útgjald eftir serligu korona ALS-skipanini, býtt á vinnugreinir?*

Viðmerkingar:
Almennu tilmælini í sambandi við COVID-19 hava havt við sær, at serliga tænastuvinnan er hart rakt. Stórt ungdómsarbeiðloysi kann væntast í summar, eftirsum at ung ofta arbeiða í tænastuvinnuni. Hesin fyrispurningur verður settur fyri at fáa greiði á, hvat landsstýrið ætlar at gera fyri at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi, og hvat býtið er á teimum, ið nú eru ella hava verið í serligu korona ALS-skipanini.

Svar:

1.
Spyrjarin sigur, at stórt ungdómsarbeiðsloysi kann væntast í summar, av tí at nógv ung arbeiða í tænastuvinnuni. Í hesum sambandi er týðandi at leggja dent á, at hugtakið ungdómsarbeiðsloysi vanliga fevnir um veruliga arbeiðsloysið millum tey, ið eru 16-25 ára gomul, t.e. tá ung missa starv, ið er teirra høvuðsvirksemi. Helst eru fleiri lesandi, ið starvast í tænastuvinuni; arbeiðið teirra í tænastuvinnuni er sostatt ein hjávinna, í mun til lesturin.

Tað er sannlíkt, at ferðavinnusesongin er farin fyri bakka í ár, og at ferðavinnan neyvan fer at hava tørv á øllum starvsfólkunum í summar. Miðlanir hava sagt frá um fyritøkur, sum longu hava sagt øllum ella nógvum av sínum starvsfólki upp. Landsstýrið arbeiðir við einum hjálparpakka til ferðavinnuna, sum vónandi fer at gera, at ferðavinnan klárar at lofta sær aftur og seinni fer at seta fólk aftur í starv. Hetta fer síðan at smitta av yvir á tann partin av tænastuvinnuni, sum er tætt knýttur at ferðavinnuni, soleiðis at tann parturin av tænastuvinnuni eisini vónandi fer at seta fólk aftur í starv.

Nógv ung arbeiða í handlum, og partar av handilsvinnuni síggja ikki út til at vera so hart raktir av almennu tilmælunum í sambandi við COVID-19. Væntandi kunnu hesi tí varðveita síni størv.

Hóast talið av løntakarum minkar, er tað ikki vist, at talið av arbeiðsleysum veksur tilsvarandi. Hetta er tí, at bert tey, ið eru tøk at átaka sær eitthvørt fulltíðarstarv verða tald sum arbeiðsleys. T.v.s., at t.d. lesandi ikki verða mett sum arbeiðsleys í hagtalshøpi, hóast tey hava mist eitt parttíðarstarv. Somuleiðis verða persónar, sum hava fylt 67 ár, ikki taldir við sum arbeiðsleys, um teir onki arbeiði hava, men teir verða taldir við sum løntakarar, um teir hava eina lønarinntøku.

Tað er eisini týdningarmikið, at arbeiðsmarknaðurin finnur seg til rættis, nú korona hevur ført til broyttan eftirspurning o.a. Tá arbeiðsmarknaðurin liggur í eini natúrligari legu, hava arbeiðsgevarar tey fólk í starvi, sum teimum tørvar. Hvørki fleiri ella færri. Hetta letur seg best gera, um landið ikki blandar seg í arbeiðsmarknaðarviðurskiftini meira enn neyðugt. Veruligu støðuna viðvíkjandi arbeiðsloysi kenna vit ikki fyrr enn skipanin við lønarískoyti fer úr gildi 30. juni.

Í Føroyum hava vit eina góða arbeiðsloysisskipan, sum rindar arbeiðsloysisstuðul til arbeiðsleys. Arbeiðsgevarar hava tí ein liðiligan møguleika at seta fólk í starv og at koyra fólk úr starvi. Tey, ið gerast arbeiðsleys verða loftað av Arbeiðsloysisskipanini.

Landsstýrið fylgir við gongdini á arbeiðsmarknaðinum, men fyribils verður ikki mett, at tørvur er á øðrum enn hjálp til ferðavinnufyritøkurnar, soleiðis at hesar yvirliva, hóast eftirspurningurin á teirra tænastum fyribils er nærum burtur.

2.
12. mai var aldursbýtið av persónum í COVID-19 stuðulsskipanini hetta:

Aldursbólkur	Tal av fólki
20	267
20-29	631
30-39	622
40-49	472
50-59	453
60-66	234
eldri	84
Fólk í alt	**2.763**

Aldur	Tal av fólki
16	33
17	64
18	63
19	107
20	85
21	69
22	65
23	60
24	64
25	53

26	52
27	49
28	64
29	70
30	68
31	68
32	64
33	56
34	71
35	64
36	60
37	62
38	57
39	52
40	56
41	44
42	40
43	45
44	61
45	53
46	41
47	49
48	45
49	38
50	61
51	42
52	54
53	59
54	45
55	39
56	42
57	40
58	36
59	35
60	46
61	37
62	30
63	36
64	36
65	26
66	23
67	15
68	11
69	13

70	6
71	8
72	7
73	8
74	3
75	2
76	3
77	5
81	3
Fólk í alt	**2.763**

Persónar, sum eru farnir úr skipanini, eru ikki taldir við.

3.
12. mai 2020 var landafrøðiliga býtið av persónum í COVID-19 stuðulsskipanini hetta:

	Aldursbólkur							
Øki	**20**	**20-29**	**30-39**	**40-49**	**50-59**	**60-66**	**eldri**	**Fólk í alt**
Eysturoy	53	156	143	102	90	53	21	**618**
Norðoyar	33	67	71	46	45	24	10	**296**
Norðurstreymoy	18	33	50	21	27	12	1	**162**
Sandoy	3	6	9	6	8	3	1	**36**
Suðuroy	10	26	32	26	29	21	10	**154**
Suðurstreymoy	138	308	260	209	188	92	30	**1.225**
Vágarnar	12	33	57	61	66	29	11	**269**
Ikki upplýst		2		1				**3**
Fólk íalt	**267**	**631**	**622**	**472**	**453**	**234**	**84**	**2.763**

Persónar, sum eru farnir úr skipanini, eru ikki taldir við. Støðan er batnað nakað síðan 12. mai 2020, sí www.als.fo, har m.a. ber til at síggja landafrøðiliga býtið.

4.
13. mai 2020 var býtið á vinnugreinar í vinnuskránni hjá TAKS hetta:

Kota	Vinnugrein	Arbeiðsgevarir	Persónar
01	Landbúnaður og veiði	2	7
05	Fiskiveiði o.a.	31	214
11	Ráolju- og nattúrugassvinna o.a.	1	95
15	Matvøru- og njótingarevnaídnaður	19	405
17	Tóvirkisídnaður	4	20
18	Klædnagerð	2	8

20	Træídnaður	2	28
21	Pappírsídnaður	1	3
22	Prentvirki og útgávustarv o.a.	9	47
25	Gummi- og plastídnaður	1	1
26	Stein-, leir- og glasídnaður o.a.	2	2
27	Metalvirki	1	1
28	Jarn- og metalvøruídnaður	6	73
33	Gerð av læknafrøðiligum útbúnaði, tólum o.ø.	1	1
35	Gerð av øðrum flutningsførum	6	15
36	Húsbúnaídnaður og annað framleiðsluvirksemi	1	2
45	Byggingarvirki	58	148
50	Søla av bilum v.m., umvæling og viðlíkahald, bensinstøðir	28	245
51	Heilsøla og umboðshandil, undantikið bilar o.a.	32	305
52	Smásøla, undantikið bilar o.a., umvælingarverkstaðir	105	512
55	Gistihús- og matstovuvirki	28	481
60	Flutningur eftir landi og flutningur í rørum	24	52
61	Skipaferðsla	7	51
62	Flutningur loftvegis	1	157
63	Hjálpartænastur í sambandi við flutning, ferðaskrivstovuvirki o.a.	11	110
64	Postur og fjarskifti	2	2
65	Banka- og fíggingarvirki	6	38
66	Tryggingarvirksemi	2	2
70	Virksemi í sambandi við fastar ognir	9	17
71	Útleiging av bilum, maskinum, útbúnaði o.ø.	5	18
72	Dátuviðgerðarvirki	9	12
73	Gransking og menning	1	4
74	Aðrar handilsligar tænastur	58	237
75	Almenn fyrisiting, verja og almannatrygging	1	24
80	Undirvísing	16	25
85	Heilsuverk og sosialar fyriskipanir	42	118
91	Felagsskapir og feløg o.a.	5	11
92	Skemtanir, mentan og ítróttur	56	297
93	Aðrar tænastuveitingar	69	102
98	Hvílandi feløg og ikki upplýst virksemi	9	15
	Ókent	330	793
		1003	**4698**

Allir arbeiðsgevarar og løntakarar, sum hava verið í skipanini fram til 13. mai 2020 eru í talvuni.

Millum teir 330 arbeiðsgevararnar, sum ikki hava eina vinnugrein í Vinnuskránni hjá TAKS, eru øll møgulig sløg av virkjum/virksemi/vinnugreinum. Har eru m.a.: tannlæknar, tollfrí søla,

venjingarmiðstøðir, heilsølur, flutningsfeløg, matstovur, byggivirki/húsasmiðir, reiðarí/skip, el-innleggjarar, frisørar, handlar, fiskavirki o.m.a.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 22. mai 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður